# LEIKSKRÁ

2. APRÍL 2025

SKRÁ NR. 2




ODDUR Á LAKJUNI

4. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur

Atli Petersen
Jan Ó. Ellingsgaard

**Myndir**
Oddur á Lakjuni

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen



**INNIHALD**

MOWI



FAROE ISLANDS

# RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY **NATURE**

Allur heimurin veit tað. Og vit í Føroyum vita tað.
Laksur úr Føroyum er heimsins besti.

Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

**RINKA.FO**

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í 1. deild

TEAM ÍF

TEAM 07 Vestur

Dómarar

Birgir Thomsen sáli

ÍF-sangurin





FORSÍÐA



TEKST: **BIRGIR PETERSEN**

# NÆSTI HEIMADYSTUR 2025

Vælkomin til dyst í 1. deild. Seinasta umfar leiktu vit javnt á útivølli móti okkara kappingarneytum AB á Argjum í einum dysti har veðrið kanska gjørdist so ófantaligt móti endanum og var við til at vit mistu taki á dystinum og lótu eitt mál inn seint í seinna hálvleiki.

Í dag er næstbesta liðið hjá 07 Vestur á vitjan og er tað neyvan at taka munnin ov fullan, at vit síggja okkum hava møguleika at fáa fyrsta sigurin, í ár, í hús.

Vit hava fingið 2 stig higartil. Hetta er ikki nóg gott, um vit skulu upp aftur í fremstu røð aftur at leika komandi kappingarár. Men tað er onki at ivast í at huglagið rundanum liðið er gott, og at vit síggja eitt lið, sum er væl fyri fysiskt, og komandi umførini fara heilt víst at geva stig av sær, tí samanspælið batnar í hvørjum og vit koyra fulldrøn á allan dystin á tamb.

Um vit hyggja eftir hesum nýggja kappingar-árinum, so sær tað út til at fleiri biðlar enn vanligt eru til uppflytingarplássini, tí B71 eru fremst við fullum stigatali, við Skála í hølunum, haraftrat eru vit saman við AB umboðaði við besta liðnum í okkara feløgunum.

**Góðan dyst øll somul.**

## *KOYRIÐ Á DRONGIR*





VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

# EFTIR TRÝ UMFØR

# STØÐAN

## Í 1. DEILD HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B71 | 3 | 3 | 0 | 0 | 5 | 0 | 5 | 9 |
| 2 | Skála ÍF | 3 | 2 | 1 | 0 | 8 | 0 | 8 | 7 |
| 3 | Víkingur | 3 | 2 | 0 | 1 | 6 | 4 | 2 | 6 |
| 4 | EB/Streym | 3 | 2 | 0 | 1 | 3 | 2 | 1 | 6 |
| 5 | AB | 3 | 1 | 2 | 0 | 4 | 2 | 2 | 5 |
| 6 | KÍ | 3 | 1 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 4 |
| 7 | ÍF | 3 | 0 | 2 | 1 | 4 | 6 | -2 | 2 |
| 8 | B36 | 3 | 0 | 1 | 2 | 3 | 6 | -3 | 1 |
| 9 | NSÍ | 3 | 0 | 1 | 2 | 3 | 8 | -5 | 1 |
| 10 | 07 Vestur | 3 | 0 | 0 | 3 | 2 | 10 | -8 | 0 |

## 4. UMFAR

| | |
|---|---|
| 02.04.25 | ÍF - 07 Vestur |
| 02.04.25 | AB - EB/Streym |
| 03.04.25 | Skála ÍF - B71 |
| 05.04.25 | B36 - NSÍ |
| 05.04.25 | Víkingur - KÍ |

## 5. UMFAR

| | |
|---|---|
| 12.04.25 | Skála ÍF - Víkingur |
| 12.04.25 | KÍ - 07 Vestur |
| 12.04.25 | NSÍ - AB |
| 12.04.25 | EB/Streym - B36 |
| 13.04.25 | B71 - ÍF |




pelagos.fo

PELAGOS
PELAGIC FISH FROM THE FAROE ISLANDS

| | |
|---|---|
| Jákup Jónsson **Nolsøe** | 1 |
| Rógvi Ey. **Jacobsen** | 2 |
| Kári **Johannesen** | 3 |
| Bjarti Jøkladal **Højbro** | 4 |
| Jákup **í Lambanum** | 5 |
| Karl Abrahamsson **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Olaf Karstensson **Hansen** | 8 |
| Rúnar **Johnsson** | 9 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Jógvan **á Lakjuni** | 13 |
| Tóri Tormóðsson **Traðará** | 15 |
| Jóhann **Jøkladal Højbro** | 16 |
| Aron **Kensson** | 17 |
| Petur Meinhard **Lundsbjerg** | 18 |
| Atli **Djurhuus Petersen** | 19 |
| Rógvi **Matras** | 20 |
| Jákup Andrias **Thomsen** | 21 |
| Bergur **Jacobsen** | 22 |
| Regin **Taye Lassaberg** | 23 |

Høvuðsvenjari: **Kristoffer Kvistgaard**
Málmansvenjari: **Sjúrður Hovland Petersen**
Fysiskur venjari: **Gunnar Hjelm**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**
Liðleiðari: **Rói Dalsá Olsen**

**INNIHALD**

| | |
|---|---|
| Sámal **á Steig** (M) | 1 |
| Hjalti **Samuelsen** | 3 |
| Jónatan **Nattestad** | 3 |
| John Finn **Poulsen** | 4 |
| Jóannis **á Steig** | 5 |
| Einar **Þorgrímsson** | 6 |
| Edvin **Jakobsen** | 7 |
| Brandur **Heinesen** | 8 |
| Rói **Olsen** | 9 |
| Jónas **Nordendal** | 10 |
| Ísakur **Johansen** | 11 |
| Markus **Johansen** (M) | 12 |
| Pætur **Akselsen** | 13 |
| Sámuel **Eyðsteinsson** | 14 |
| Eiler **Fróðason** (L) | 15 |
| Lucas **Gardar** | 17 |
| Sølvi **Egilsson** | 18 |
| Rasmus **Helgason** | 19 |

Høvuðsvenjari: **Sasa Jovanovic**
Hjálparvenjari: **Predrag Jeremic**

INNIHALD



DÓMARI

Dagfinn **Forná**


solar
Tín loysn til grøna orkuskifti
solar
Veitari til føroysku vinnuna
www.solar.fo - Brekkutún 2 - 188 Hoyvík - tlf. 35 79 33


SPEKT
løggildir
grannskoðarar
Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34
Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Heildarloysn fyri kappingarføran prís
Lætt og ómakaleyst
XBRL, skatt, bókhald, MVG, roknskap og annað
Nú eisini skrivstovu í Klaksvík
Sjálvuppgáva
TAKS
Ring ella les meira um okkara
heildarloysnir á www.spekt.fo

NÝRÙM

Teknistova

einar@nyrum.fo

tlf 78 88 99






# MINNAST TIT

# Birgir Thomsen?

Birgir var partur av
FM-vinnandi liðinum hjá ÍF

EFTIR: SIGNAR Á BRÚNNI

Birgir varð føddur 27. November 1952 í Fuglafirði. Foreldrini vóru Lydia og Martin.

Sum smádrongur var hann sera raskur, kurlandi og altíð við fullari ferð. Spældi niðri á sandi, fekk fleiri karmar góðar summardagar. Hann engdi skjótt, og teir, ið bátarnar áttu, fegnaðust, tá ið Birgir kom at egna. Abbi hansara, gamli Gordon, hevði mangan á munni, hvussu raskur og ágrýtin abbasonurin var og okkurt gott fór at spyrjast burtur úr honum. Beiggi mín Arthur, arbeiddi á Havsbrún saman við Birgiri, og hann segð mangan, hvussu væl Birgir dugdi at arbeiða og leggja til rættis. Birgir nýtti meginpartin av síni frítíð til ítrótt og serliga fótbólt. Tað er ikki ov nógv sagt, at her var hann ein úrmælingur. Eisini her vísti hann vilja, ágrýtni og gott skil.

Hann plagdi at spæla vinstri vongur, og eg tori at siga, at hann mundi vera ein tann besti vong-spælarin í Føroyum, tá hann var uppá sítt besta. Á landsliðinum var hann eisini.



Eg kann minnast, at enski venjarin Bobby Bolton segði nakað soleiðis um Birgir: "Hevði eg kunnað vant Birgir í 3 ár, so kundi hann verðið stórspælari á altjóða støðið. ÍF-liðið spældi fleiri ferðir á Selfossi í Íslandi, og íslendingar løgdu eisini merki til føroyska vinstravongin Birgir. Ta einu ferðina farið varð við ferju, datt ein smágenta fyri borð, ið skelkaði fólkið umborð, men knappliga leyp ein maður á bláman og bjargaði gentuni. Maðurin var Birgir Thomsen.

Tá ið fótbóltstíðin var liðug hjá Birgiri, fekk hann avbjóðingar at dragast við. Eina dóttir átti hann, ið eitur Sidsel, sum býr í Danmark. Nógvir smádreingirnir í ÍF, sum høvdu Birgir sum fyrimynd í fótbólti. Fyri fótbóltin í Fuglafirði var Birgir gullverdur.


Her sæst hann uttanfyri barnaheimið saman við mammu síni (Lydia), lítla Lydia og Jóhannus sála


Her sæst Birgir, júst komin upp á turt eftir at hava bjargað smágentu frá at druknað.

BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


MEST
Føroya
størsta
goymsla
av rustfríum vørum
Opið er mánadag til fríggjadag: 8:00-16:10
Vestara Bryggja, Tórshavn | Fjøruvegur 3, Runavík | Bryggjan, Skála


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO



# INNIHALD

E&B VIRKIÐ

TAKK FYRI STUÐULIN

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**